KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

# Klaksvíkar Býráð

**Dagfesting:** 15.12.2016 kl. 17:30
**Málnr.:** 13/00245 Gerðabók

Nevndarlimir: Jógvan Skorheim, Steinbjørn O. Jacobsen, Gunvá við Keldu, Óluva Klettskarð, Jóhann Lützen, Kristian Eli Zachariasen, Signhild V. Johannesen, Eyðstein Ó. Poulsen, Erling Petersen, Atli S. Justinussen og Herfrí J. Sørensen.

Onnur: Tummas T. Eliasen, kommunustjóri
Protokollførari: Jensa Anthoniussen, stjórnarskrivari

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til viðgerðar** | | |
| 125/16 | 16/01158-7 | Fyrispurningur um annað lendi í Svínoy til bátasavn hjá Bjarnafossi |

## 125/16
## 16/01158 Fyrispurningur um annað lendi í Svínoy til bátasavn hjá Bjarnafossi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 05.12.2016 | 91/16 | |
| 2 Mentanarnevndin | 06.12.2016 | 50/16 | |
| 3 Fíggjarnevndin | 13.12.2016 | 97/16 | |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 15.12.2016 | 125/16 | |

**Frágreiðing um málið:**
Víst verður til málslýsing

- frá teknsku umsiting dagf. 17.11. 2016
- niðurstøðu Svínoyarnevndarinnar frá 28.11.2016
- umsókn frá Áhugafelgnum Bjarnafossur móttikin 1.12.2016 við kortskjali yvir aktuella økið og skrivi frá stjóranum á Búnaðarstovuni

Ongin byggisamtykt er galdandi fyri økið, men í uppskotinum til byggisamtykt - sum tó ikki er endaliga samtykt av býráðnum - er umrødda økið staðsett í økisparti D41 – útlagt til grønt øki. Umsitingin metir tó ikki nakra byggisamtyktarliga forðing vera fyri ætlanini, um býráðið (saman við staðbundnu nevndini) ynskja økið gagnnýtt til bátasavn.




Staðsetingin liggur upp at til- og frákoyringarvegnum frá tyrlupallinum. Bygging her er tí treytað av góðkenning frá Landsverk

Sambært frágreiðing frá stjóranum á Búnaðarstovuni kann lendið helst langtíðarleigast frá Búnaðarstovuni fyri eitt árligt gjald á kr. 5000,-, um *"kommunan gerst formligur partur av áhugafelagnum Bjarnafossur ella formligur samstarvspartur hjá felagnum"*
Sí niðanfyri úrrit úr kunngerð nr. 96 frá 3. juli 2013 um umsiting av landsjørð:

> 15) 2) Fyri leigusáttmála millum Búnaðarstovuna og kommunu um lendi til almannagagnligt endamál kr. 5.000,- um árið. Leiguupphæddin verður prístalsviðgjørd sambært galdandi kunngjørt prístal frá Hagstovu Føroya.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Fyri leigu av lendi: 5000,- árliga

**Tilmæli:**
Málið verður lagt fyri nevndir og býráð til umrøðu og støðutakan til, hvørt kommunan í fyrstu atløgu skal vera partur í verkætlanini við at virka og rinda fyri útvegan av lendi eftir leiguprinsippinum nevnt omanfyri.

**UBN 05-12-2016**
Nevndin tekur undir við málinum, men beinir stuðulspartin til Mentanarnevndina.

**MeN 06-12-2016**
Nevndin tekur undir við at stuðla lendisleiguni við kr. 5.000,- árliga, eftir at lendisviðurskiftini eru komin upp á pláss. Greiða verður eisini at fáa á tí lendi, sum ætlanin er at leggja afturat matr. nr 76$^{c}$.

**FíN 13-12-2016**
Nevndin tekur undir við UBN 05-12-2016 og MeN 06-12-2016.

**Býráðsins samtykt 15-12-2016**
Tilmælið frá FíN 13-12-2016 einmælt samtykt.